# BEISKIR BITAR SKULU SVØLGJAST

**POLITIKKUR -Tung tøk liggja fyri framman, og truplar avgerðir mugu takast við samráðingarborðið. Men vit koma ikki á mál, um vit bara eru før fyri at vísa á, hvar ikki kann sparast, ella nýggjar inntøkur ikki kunnu fáast, segði Kaj Leo Johannesen í ólavsøkurøðu sínari**

Eyðun Klakstein

Løgmaður viðkennir, at ein trupult politiskt heyst er fyri framman, og at politikarar og flokkar mugu svølgja beiskar bitar, um samgonguni skal verða lív lagað.

- Seinnu árini hevur okkara samfelag havt stóran vøkstur, og almennu útreiðslurnar eru vaksnar nógv. Men brádliga noyddust vit at umstilla okkum til ein nýggjan búskaparligan veruleika. Hallið hjá landskassanum er vaksið. Javnvág er ikki millum inntøkur og útreiðslur, fyrst og fremst tí vit hava skorið ríkisveitingina og givið skattalættar, uttan at samsvarandi sparingar vóru framdar, ella nýggjar inntøkur fingnar til vega, segði Kaj Leo Johannesen.

- Nógvar truplar, men tó neyðugar avgerðir eru tiknar, og enn fleiri umrøddar í almenna rúminum. Tað hevur skapt órógv - eisini í politisku skipanini. Men í ringum sjógvi er tað óðamannaverk at sleppa stýrisvølinum. Seglini mugu repast, men tað er áræði og ábyrgdarkensla, sum ber eitt samfelag gjøgnum krepputíðir, og skulu vit føra samfelagið burtur úr vandaleið, mugu allir partar taka byrðar á sínar herðar.

## Beiskir bitar

Løgmaður viðurkendi, at tað verður trupult at fáa kabalin at ganga upp, tá ið fíggjarlógin skal gerast í heyst.

- Betri er bøtandi hond enn spillandi tunga. Eg havi tí og fari framhaldandi at rætta hondina út til samstarv, eisini við andstøðuna. Tung tøk liggja fyri framman, og truplar avgerðir mugu takast við samráðingarborðið. Men vit koma ikki á mál, um vit bara eru før fyri at vísa á, hvar ikki kann sparast, ella nýggjar inntøkur ikki kunnu fáast. Og semjurnar fáast ikki, uttan at onkrir beiskir bitar verða svølgdir, segði Kaj Leo Johannesen.

- Leiðin burtur úr kreppuni kann gerast drúgv, men tað eru vit, sum velja hvørja leið, vit taka. Vit hava valið millum at skerja vælferðina ella fremja broytingar, so vit fáa skynsamari rakstur og betri tænastur. Vit hava valið millum at bróta upp úr nýggjum og gerast ein meira samrunnin partur av alheimssamfelagnum ella at standa í stað.

- Vit hava valið millum at gera kakuna størri ella at brúka alla orkuna uppá at býta hana, segði løgmaður.

Týsdagin skal løgtingið viðgera ólavsøkurøðuna hjá løgmanni.

eydun@sosialurin.fo




*- Leiðin burtur úr kreppuni kann gerast drúgv, men tað eru vit, sum velja hvørja leið, vit taka, segði Kaj Leo Johannesen*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Skikka okkum væl á ólavsøku

**Løgreglan veit ikki um nakran álvarsligan tilburð um ólavsøkuna. Góða veðrið og góða lagið eru helst orsøkin, heldur vakthavandi á løgreglustøðini**

Leo Poulsen

Sjálvt um tað sjáldan hava verið fleiri fólk á ólavsøku, so hevur hon roynst løgregluni stak friðarlig.

- Tað hevur ikki verið øðrvísi enn eitt vanligt vikuskifti, sigur vakthavandi á løgreglustøðini.

Í onkrum einstøkum føri hava menn verið uppi at takast, men í morgun visti løgreglan bert um ein einstakan tilburð.

- Tað kann tó verða, at onkur fráboðan kemur seinni. Tað vísir seg tíðum, at tá menn vakna aftur dagin eftir, at teir koma á løgreglustøðina at boða frá einumhvørjum, sigur vakthavandi.

Men fyri tað, at tað hevur verið friðarligt, so hava løgreglan havt úr at gera kortini. Tað hevur verið nógv fult fólk, og teimum hevur løgreglan so hjálpt upp ella fingið tey til hús.

- Bert fá hava sovið rúsin av sær her á støðini, sigur vakthavandi.

Hann heldur, at tað munnu hava verið so nógv fólk á ólavsøku, sum tað kann, og hann ivast heldur ikki í, at góða veðrið og harav góða lagið hava hjálpt til, at so lítil ófriður hevur verið.

Skaðastovan hevur tó eisini havt nakað at gera.

- Tað er altíð so, at onkur sker seg ella dettur og fær ein snudd, so fólk enda altíð á skaðastovuni, sigur vakthavandi.

Men sigast má, at føroyingar duga væl at hugna sær á ólavsøku, og at vit hava skikkað okkum serliga væl hesa tjóðarhátíðina.



*Hóast ólavsøkan hevur verið stak friðarlig, so hevur løgreglan kortini havt ivaleyst at gera við fullum fólki*

Mynd: Jens Kristian Vang